30 ár í skeljum

Fríggjadagin 1. desember vóri 30 ár li›in, sí›an virki› hjá O C Joensen á Oyri tók í móti fyrstu Jákupsskeljunum

MERKISDAGUR
Edvard Joensen

Oyri: Hóast oyrarfólk hava veri› í skeljum í 30 ár, gongur hampiliga væl kortini. Fríggjadagin 1. december vóru 30 ár li›in, sí›an Skeljavirki› á Oyri tók móti teimum fyrstu skeljunum. Samstundis høvdu tvær av kvinnunum, sum vóru til arei›is tann fyrsta dagin, eisini 30 ára starvsdag hjá fyritøkuni O C Joensen.

1. december 1970 leg›i Poppy hjá O C Joensen fyrstu skeljarnar upp á bryggjuna á Oyri. Skeljarnar vór›u koyrdar inn í gamla húsi› sunnan fyri kraftfó›urgoymsluna hjá Pouli á Oyri, har tær vór›u loypar í eini gassgr‡tu og sí›an skildar vi› hond á einum træbor›i vi› eini takrennu í mi›uni.

Anna Maria Petersen og Lydia Dahl av Oyri vóru tvær av trimum kvinnum, sum vóru til arbei›is hendan dagin. Tær eru bá›ar í fyritøkuni enn, hóast tær nú arbei›a á rækjuvirkinum.

Tri›ja kvinnan, sum var til arbei›is fyrsta dag, var Súsanna Andreasen av Oyri, sum nú er givin at arbei›a.

Tær tríggjar reinsa›u skeljarnar vi› hond. Loyptu skeljarnar komu upp á bor›i›, har tær vór›u hola›ar vi› skei›, og reinsa›u vøddarnir latnir ni›ur í takrennuna á mi›um bor›inum, ha›ani teir so fóru í posar, sum vóru sendir a›rasta›ni at frysta. Anna Maria og Lydia halda seg minnast, at skeljarnar fyrstu tí›ina vór›u frystar í Hvalvík og á Ei›i. Sjálv skelin og annars ta›, sum burtur var› koyrt, var› tveitt í kurvar, sum stó›u á gólvinum.

Saman vi› teimum trimum sum reinsa›u, var eisini Johan Poulsen, vanliga nevndu Hanni, av Oyrarbakka. Hanni doy›i fyri nøkrum árum sí›an. Hann hev›i millum anna› til arbei›is at loypa skeljarnar.

Her var ta›, at hendan vælsigna›a gassgr‡tan kom fyri, minnast Lydia og Anna Maria. Skeljarnar vóru koyrdar í kurvar, sum sí›an vór›u settar ni›ur í gr‡tuna, til tær vóru loyptar, og sí›an stoyttar á bor›i›.

Ikki var› altí› hugsa› so nógv um krøv tá, sum ta› er í dag. Til dømis var vanligt, at fólk gekk inn á gólvi› at práta, me›an arbeitt var›. Eingin Heilsufrø›ilig Starvsstova var tá, grei›a tær bá›ar, Lydia og Anna Maria frá.

Og har var heldur ikki so nógv anna›, sum í dag er vanligt og hoyrir til. Eitt nú matarhøll. Í dag sita tey uppi á loftinum í n‡ggja virkinum í stásiligari matarhøll vi› fluguneti fyri øll vindeygu, sum kunnu latast upp. Solei›is var ikki, tá byrja› var›. Tá var fari› vi› varmafløskuni inn í goymsluni hjá Pouli á Oyri, har tær funnu sær ein kraftfó›ur- ella tø›sekk, sum tær so settu seg á at fáa sær ein kaffimunn. Og høvdu tær hug at roykja, fóru tær bara útum, og komu so aftur, tá li›ugt var. Einki vi› at stíga í steriliserandi løg á vegnum ella naka› sovor›i›. Men tær royktu tó ikki, me›an tær stó›u yvir bor›inum og arbeiddu.



Høgni Sóloy, virkislei›ari á Skeljavirkinum á Oyri

Mynd: Jens K. Vang

Ta› gamla er fari›

Í dag er alt ø›rvísi, enn ta› var í byrjanini, sigur Høgni Sóloy, virkislei›ari. Og tá meinar hann heilt bókstaviliga ø›rvísi, sigur hann.

Ta› arbei›a í dag umlei› 100 fólk á bá›um virkjunum hjá O C Joensen. Mest er á rækjuvirkinum, sum eisini er nógv tann størri parturin av virkseminum, hóast skeljavirki› er ta› eldra.

Á sjálvum skeljavirkinum arbei›a í dag 17 fólk. Umframt eru seks mans vi› Nor›heim, sum trolar eftir skeljum og leggur upp á Oyri. Til samanberingar nevnir Høgni Sóloy, virkislei›ari, at tá hetta n‡ggja virki› lat upp í 1981, arbeiddu 75 fólk bara har. Men sí›an er rationalisera›. So hóast framlei›slan er rættiliga nógv størri í dag, enn hon var tá, er bara ein partur av fólkatalinum til arbei›is á Skeljavirkinum. Restina klára maskinurnar, sigur hann.

Høgni Sóloy sigur, at virki› sum er arbei›ir umlei› 5.000-6.000 tons av lidnari vøru árliga. Nøgdin hevur veri› vaksandi, sigur hann. Ta› sæst á hagtølunum, sum siga, at seinastu 10 árini hevur me›alúrtøkan veri› umlei› 3.500 tons.

Men í ár sær út til at vera heldur slakari, sigur Høgni Sóloy. Hann væntar, at ta› ver›ur kanska ikki meira enn til eini 2.500 tons í ár, og ta› er líti›.

Ójøvn úrtøka

Vanliga plagar úrtøkan av lidnari vøru at liggja um eini 8-9% av tí, sum fiska› ver›ur. Men so koma ár ímillum, har úrtøkan lækkar. Og ári› í ár hevur veri› eitt tílíkt ár, sigur virkislei›arin. Hann væntar ikki meira enn eini 5% í ár. Ta› kemst av, at sjálv skelin er størri enn vanlig ár, umframt at tær eru rættiliga gjarvaksnar. Men sjálvur vøddin ver›ur tó ikki størri enn ta› sama, og ta› er hann, sum brúktur ver›ur. Hvør orsøkin er til, at skeljarnar vaksa og ver›a gjarvaksnar, veit virkislei›arin á Skeljavirkinum ikki at siga.

Høgni Sóloy, virkislei›ari á Skeljavirkinum á Oyri, sigur, at prísurin fyri skeljavøddarnar hevur veri› sera ójavnur gjøgnum árini. Onkuntí› hevur hann veri› ni›ri á 23,- kr, fyri kg. Í ár liggur hann um tær 50,- krónurnar. Skeljarnar av Oyri ver›a seldar til Fraklands.

Ta› hevur eisini veri› rættiliga skiftandi, hvussu nógv fólk hevur fiska› skeljar gjøgnum tí›irnar.

Fyri nøkrum árum sí›an vóru umlei› 20-25 mans, sum fiska›u 2.000 tons av skeljum. Tá vóru eini tvey størri skip umframt fleiri smærri bátar, sum trola›u. Í dag klára teir seks menninir vi› Nor›heim at fiska meira enn ta› dupulta einsamallir. Eisini var eitt skifti eitt anna› skeljavirki í landinum, Men ta› gavst rættiliga skjótt aftur.

Høgni Sóloy, virkislei›ari á Skeljavirkinum á Oyri, sigur, at hansara meting er, at ta› er ikki pláss fyri fleiri skipum at fiska skeljar. Tí›in, fiska› ver›ur, er stutt, og nú vísir ta› seg eisini, at naka› væl av tí› fer til leiting.

Fyri nøkrum árum sí›an mælti Fiskirannsóknarstovan - vi› fyrivarni - til, at ta› ikki ver›a fiska› meira enn umlei› 5.000-7.ooo tons av skeljum undir Føroyum. Og ta› hóskar væl til ta›, Nor›heim klárar, heldur Høgni Sóloy.

Lydia Dahl og Anna Maria Petersen fingu gávur frá fyritøkuni O C Joensen. Tær hava arbeitt á Skeljavirkinum frá fyrsta degi
Mynd: Jens K. Vang

Greinar hjá Høgna koma út í bók



Forlagi› Sprotin gevur í næstum út eina bók vi› úrvæli av greinum og rø›um, sum Høgni Hoydal hevur skriva›

POLITISKAR BÓKMENTIR

Høgni Hoydal, landsst‡rismа›ur í sjálvst‡rismálum, hevur savna› saman eitt úrval av greinum og rø›um, sum hann hevur skriva›, sum koma út í bók í næstum.

Ta› er forlagi› Sprotin, i› hevur heitt á Høgna Hoydal um at savna saman hetta tilfar til at geva út í bók.

Høgni Hoydal sigur, at úrvali› í bókini grundleggjandi kemur at snúgva seg um ta› at taka fulla ábyrgd av egnum landi. Men hetta merkir ikki, at bókin bert sn‡r seg um gongdina í fullveldismálinum sum so. Fleiri av greinunum vi›gera nevniliga, hvat krevst av einum samfelag, sum skal taka fulla ábyrgd av sær sjálvum.

Sambært Høgna Hoydal, er ta› ikki hann, sum av sínum eintingum hevur tiki› stig til at geva út hesa næstu bókina eftir hansara hond. Ta› var forlagi› Sprotin, sum fegi› vildi hava tilfar frá honum til eina bók, og ta› hevur ta› fingi›.

Fyrra bókin útseld

Í apríl gav danska forlagi› Lindhardt og Ringhof út fyrstu bókina eftir Høgna Hoydal. Hetta var bókin »Myten om rigsfællesskabet«. Tá var ta› eisini forlagi› sjálvt, i› heitti á Høgna Hoydal um at skriva eina bók.

»Myten om rigsfællesskabet«, sum vi›ger bakgrundina fyri hugsjónini um føroyskt fullveldi, er útseld, og ver›ur nú endurprenta›. Í apríl var› hon prenta› í 1.500 eintøkum.

Høgni Hoydal sigur, at hann hev›i nógv strí› av at skriva fyrru bókina. Tá var hann nevniliga noyddur at seta seg ni›ur at skriva alla bókina, og var› nógv av hesum arbei›i gjørt um náttina.

Til hesa seinnu bókina kravdist ikki meira, enn at Høgni Hoydal setti seg vi› telduna at finna fram hóskandi greinar og rø›ur, sum hann hevur skriva›, og fínpussa tær eitt sindur.

Høgni Hoydal heldur, at ta› hevur veri› ógvuliga mennandi at skapt tilfar til bá›ar bøkurnar.

– Hetta er naka›, sum hevur gjørt, at eg havi veri› noyddur at endursko›a alt mítt arbei›i sum politikari, og ta› er sunt, sigur Høgni Hoydal.

Sjálvst‡risflokkurin broytt bygna›

Sjálvst‡risflokkurin skal nú hava eina flokslei›slu og ein politiskan fomann, sum er talsma›ur úteftir

POLITIKKUR
John Johannessen

Á floksfundi leygardagin samtykti Sjálvst‡risflokkurin at broyta lei›slubygna›in fyri flokkin.

Eftir verandi skipan hevur Sjálvst‡risflokkurin ein formann í tingbólkinum og ein formann fyri landsnevndina. Forma›urin fyri landsnevndina virkar sum forma›ur fyri baklandi, me›an forma›urin í tingbólkinum er politiskur forma›ur.

Hendan skipan hevur veri› heldur ørkymlandi, tí hon hevur skapt iva um, hvør er veruligi forma›ur floksins. Flokkurin og fólk yvirhøvur hava ivast í, hvør av hesum formonnum er tann, i› alment eigur at melda út vegna flokkin.

N‡ggja skipanin leggur upp til, at flokkurin framvegis skal hava ein politiskan formann og ein formann fyri landsnevndina. Men eftir n‡ggju skipanini skal ta› ver›a politiski forma›urin, i› er talsma›ur floksins úteftir. Forma›urin fyri landsnevndina skal taka sær av ymsum umsitingarligum uppgávum og samskipan. Floksforma›urin skal anna›hvørt vera løgtingsma›ur ella landsst‡risma›ur.

Bá›ir formenninir ver›a valdir beinlei›is á hvørjum landsfundi.

DAIHATSU SIRION

Royn tann sera vælumtókta og orkusparandi bilin

Heilt upp til 20 Km/l

3 árs/100.000 km garanti

Daihatsu er kendur fyri at vera ein tann mest orkusparandi, álítandi og slitsterki japanarin á marknaðinum.

Útstýr: Servostýring - ABS - Airbags - El-spegl - Radio - Startsperru - Viskari aftan v.m.

Kr.116.800

Vælkomin til ein óbindandi royndartúr

D. B. Bilar

J. Broncksgøta 15 - Tlf. 310600

Sosialurin - 311820